## Kaldur januar

Tað hevur verið óvanliga kalt í grannalondum okkara fyri eystan í vetur. Norska tíðindastovan NTB skrivar, at í meðal frysti tað 8,1 stig í Oslo í januar, og tað er næstan fýra stig kaldari enn meðal undanfarin ár. Samanumtikið var januar í ár tann kaldasti í Suðurnoregi síðani 1987, og nógvastaðni har suðuri í landinum var januar ein tann kaldasti, síðani mátingarnar byrjaðu fyri 110 árum síðani. Harafturímóti hevur tað ikki verið óvanliga kalt í Norðurnoregi - bara 0,1 stig kaldari enn meðal, skrivar NTB.



## Bashir nærkast fólkamorði

Altjóða revsirætturin í Haag hevur ákært sudanska forsetan, Omar Hassan al-Bashir, fyri sjey ymisk lógarbrot, og nú bendir alt á, at hann verður ákærdur fyri fólkadráp eisini. Higartil hevur revsirætturin sýtt fyri at ákæra al-Bashir fyri fólkadráp, tí málið var ikki nóg væl lýst í ákæruritinum. Men nú hevur ein kærudómstólur góðkent ákæruritið, og tí bendir alt á, at forsetin eisini verður ákærdur fyri fólkadráp í Darfur, skrivar AFP. ST hevur met, at umleið 300.000 fólk hava latið lív í ágangi í Darfur, og at 2,7 milliónir eru flýdd frá húsi og heimi.

# Skemtiligar stundir í Løkshøll

**Spælið er sannførandi og stuttligt, og serliga flowið er frálíkt í glantrileikinum »Stundum, stundum ikki«, sum Klaksvíkar Sjónleikarafelag spælir í Løkshøll í hesum døgum**

UMRØÐA
*Nikolina og Heini Olsen*

Hóast Klaksvíkar Sjónleikarafelag ikki hevur havt bestu umstøðurnar seinnu árini, so sæst hvørki til vantandi hug ella vantandi dygd hjá klaksvíkingum – heldur er tað tvørturímóti. Tað frættist í Klaksvík, at felagið er virkið við ambitiónunum á røttum stað; seinastu mánaðirnar hava bæði ung og eldri vant í kjallaranum á gomlu Brandstøðini í Klaksvík saman við íslendska leikstjóranum Sagu Jónsdóttur. Sama kvinna stóð eisini fyri vælumtókta *Emil úr Lønnibergi*, ið felagið framførdi fyri einum ári síðani. Nú eru tey aftur á palli. Hesaferð í Løkshøll í Runavík og aftur við einum altjóða leiki, nevniliga skemtileikinum *Stundum, stundum ikki*, ið byggir á *Weekend in Paradise* eftir týsku Arnold & Bach.

Leikurin gongur fyri seg á tveimum støðum: í einum aðalráði í Havnini – ella "málaráði", sum tað skemtiliga verður kallað – og á einum baðihotelli við Múrin í Kirkjubø. Hetta umframt verður sipað til eina vátliga forsøgu, har ein av høvuðspersónunum hevur verið í býnum, men bert minnist til brotpartar av tí. Einari farsu líkt verða pettini stig fyri stig borðreidd fyri áskoðaranum, men tað í einum heldur eldfimum mosaikki; áskoðarin skilir, at drukkið varð kátt, at einki var ófórt, at váta kvøldið var ein rokan í fjøruni, har menn vóru menskir, og hjúnabandið var nakað, ið stillisliga varð gingið um; inn í gerandisdagin hjá gifta og nú edrúa manninum trína eiggilig sprund, samstundis sum blá eygu og hovnar høkur kasta óunniligar metonymiskar skuggar frá gildinum, og onkrastaðni djúpt inni í minninum daga fram pappageykar, konufólkarevar og forsagdir gamlir dreingir.

Ljóðar hetta fløkt? Tað er tað eisini! Og greiðari verður tað ikki, tá ið leikurin verður kryddaður við moralprædikandi gomlum gentum, fráhaldandi frelstum mammudreingi við eini skuggasíðu, sum vildi fingið ein Don Juan at rodna av skomm, maktgirnd, øvundsjúku, grenji, óætlaðum partnarabýti, lættlivandi monnum og skjótum kvinnum o.s.fr.

Ólagið, sum forsøgan setur gongd á, verður størri og størri, sum leikurin líður, og spenningurin økist líka til síðstu pallmynd, tá ið træðrirnir samlast aftur. Alt plottið skal sjálvandi ikki avdúkast her, tí tað skulu tit, sum ikki hava sæð leikin, sjálv sleppa at gleða tykkum til.



*Bæði eldri og yngri leikarar fáa roynt seg í »Stundum, stundum ikki«. Her eru tað Jórun Ljóstein sum løgtingskvinnan Hermina og Jógvan Salomon Joensen í leiklutinum sum Sofus, vertur á Kirkjubøar Baðilandi*

**Leikarar:**

| | |
|---|---|
| Jan Gardar | Hálvdan Hálgadal, skrivari í málaráðnum |
| Jórun Ljóstein | Hermina, løgtingskvinna |
| Jógvan Eliasen | Gerhard, skrivstovustjóri í málaráðnum |
| Bjarni Ziska Dahl | Grímur Karlsen og løgreglumaður |
| Per Johannesen | Dagfinn Finnson, fulltrúi í málaráðnum |
| Jógvan Salomon Joensen | Sofus, vertur á Kirkjubøar Baðilandi |
| Susan Gudjónsson | Tutti |
| Eliana Svøðstein | Dorit, skrivstovukvinna í málaráðnum |
| Høgni Olsen | Ásbjørn, assistentur í málaráðnum |
| Erla Jacobsen | Katrin, kona Hálvdan Hálgadal |
| Finn Stampe | Bogi, duravørður í málaráðnum, gestur á baðilandinum |
| Danny Baldursson | Hotelvørður |
| Harriet Joensen | Lilly |
| Óli G. Samuelsen | Karl Smart og ráðharri |
| Saga Jónsdóttir | Leikstjóri |

Áskoðarin varnast beinanvegin, at sjónleikarafelagið hevur tikið bæði meira og minni royndar leikarar inn í leikin. Summir av leikarunum eru gamlir kenningar, ið hava staðið á palli í mong ár, og aðrir leikarar eru blaðung óskrivað bløð. Kortini riggar heildin. Spælið er sannførandi og serliga tempoið/flowið er frálíkt. Tað er stuttligt at síggja onkrar gamlar kenningar aftur á palli saman við Klaksvíkar Sjónleikarafelag eftir drúgvan steðg. Og tað er eisini stuttligt at síggja, at summi av teimum ungu falla natúrligt inn í spælið á pallinum, hóast royndirnar ikki kunnu vera mangar hjá øllum. Júst hetta at byggja brýr millum ættarliðini er skilagott og gevur góða vón um framtíðina. Tey ungu skulu læra og koma fram, men brúk er sanniliga eisini fyri teimum meira tilkomnu.

Karmarnir um leikin eru eisini frálíkir – eitt er Løkshøllin, sum stendur ikki nógv eftir Norðurlandahúsið – og annað eru pallmyndin, tónleikurin og ljósið. Leikurin er væl framførdur, og umstøðurnar eru serstakliga góðar.

Vilja tit hava eitt gott kvøld, so er valið lætt: farið í Løkshøll og hyggið at »Stundum, stundum ikki«!